gult cyan magenta svart



# Ikki bundin at sáttmálanum

*Einans Hotel Vágar er bundið at sáttmálanum millum Føroya Abeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, tí bara Hotel Vágar er limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, ið undirskrivaði sáttmálan. Sáttmálin fyri arbeiði á matstovum, gistingarhúsum og hotellum er ikki galdandi fyri restina av vinnuni*

RÚNAR REISTRUP

Einki av teimum níggju virkjunum innan matstovu- og gistingarhúsvinnuna, sum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðarafelag nevndu í yvirlýsing síni týsdagin, hevur nakra sum helst skyldu at fylgja sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Yvirlýsingin hjá teimum tveimum arbeiðarafeløgunum legði hart eftir teimum níggju virkjunum fyri ikki at vilja fylgja sáttmálanum, men sum er, hava tey onga skyldu at løna starvsfólki sambært sáttmálanum ella veita teimum tær treytir, ið sáttmálin ásetir.

Virkini eru nevniliga ikki limir í Arbeiðsgevarafelagnum, og starvsfólk teirra eru fyri størsta partin ikki limir í Arbeiðarafelagnum, og tí eru tey ikki umfatað av sáttmálanum fyri arbeiði á matstovum, gistingarhúsum og hotellum.

Hetta staðfestir Jan Mortensen, stjóri á Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Hann sigur, at einasta virki innan hesa vinnu, ið er limur í Arbeiðsgevarafelagnum er Hotel Vágar, og tískil er bara Hotel Vágar bundið at sáttmálanum.

**Gistingarhúsfelagið undir samráðingar**

Í gjár boðaði Gistingarhúsfelagið frá, at tað fer at taka samráðingar upp við Føroya Arbeiðsgevarafelag beint eftir summarfrítíðina. Hetta verður eftir øllum at døma gjørt, tí Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag hava megnað at lagt trýst á limirnar í Gistingarhúsfelagnum um at fáa skipaði starvsfólkaviðurskifti í lag innan vinnuøkið matstovur, gistingarhús og hotel.

Jan Mortensen, stjóri í Føroya Arbeiðsgevarafelag váttar, at Gistingarhúsfelagið hevur biðið um fund við Arbeiðsgevarafelagið, og sigur, at hesin fundur helst verður um miðjan august, tá fólk eru komin aftur úr feriu.

Á fundinum fer Gistingarhúsfelagið at gera vart við, hvørjar partar av sáttmálanum fyri arbeiði á gistingarhúsum og matstovum, felagið ikki tekur undir við.

Hvat síðan hendir, kunnu hvørki Jan Mortensen, ella formaðurin í Gistingarhúsfelagnum, Jeffri Johannesen, siga nakað um, tí tað veldst alt um, hvat Gistingarhúsfelagið velur at gera. Tað er tó hugsandi, at limirnir í Gistingarhúsfelagnum fara at gerast partur av Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum so kann taka samráðingar upp við Føroya Arbeiðarafelag um eina endurskoðan av sáttmálanum.

# Frontarnir eru uppteknaðir

***Bakgrund:** Málið um arbeiðs- og lønarviðurskiftini hjá starvsfólki í hotel- og matstovuvinnuni, fekk eina harða byrjan og hevur tikið eina løgna vend. Nú snýr málið seg ikki longur bert um umstøðurnar hjá starvsfólkunum, men eins nógv um verandi sáttmáli er tað, sum hann gevur seg út fyri at vera.*

RÚNAR REISTRUP

Stríðið um lønir og arbeiðsumstøður hjá starvsfólki innan gistingarhús og matstovur heldur fram. Síðan ellivu starvsfólk vórðu uppsøgd á Cafe Natúr týsmorgunin, hava tíðindaskriv frá pørtunum streymað út til fjølmiðlarnar.

Enn er einki ítøkiligt hent, annað enn tað, at ellivu fólk hava mist arbeiði sítt á Cafe Natúr. Hesi starvsfólkini siga seg ikki ætla sær at leggja forðingar fyri arbeiðið hjá fyrrverandi arbeiðsgevara sínum, men Havnar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðarafelag hótta við at seta tiltøk í verk ímóti matstovum og gistingarhúsum, ið ikki vilja fylgja sáttmálanum, sum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag undirskrivaðu í fjør.

Sambært Havnar Arbeiðskvinnufelag, fer herferðin fyri betri arbeiðsviðurskiftum á landins hotellum, gistingarhúsum og matstovum ikki at steðga, fyrr enn hesi ganga undir treytirnar í verandi sáttmála.

Hinvegin sigur Gistingarhúsfelagið, at tess limir ongantíð fara at ganga undir treytirnar í verandi sáttmála, sum teir als ikki vilja kennast við.

**Byrjaði týsdagin**

Seinnapartin týsdagin settu Havnar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðarafelag hol á stríðið við einari yvirlýsing, har níggju matstovur og hotel, átta í Havn og eitt í Runavík, beinleiðis vórðu løgd undir ikki at vilja virða vanliga rættin hjá starvsfólki at arbeiða eftir skipaðum arbeiðs- og lønarviðurskiftum. Grundgevingin var, at hesi hotel og hesar matstovur, ikki vildu fylgja galdandi sáttmála.

7-mannabólkurin, ið umboðar 32 av landsins fakfeløgum, boðaði so hósmorgunin frá í eini yvirlýsing, at hann stuðlar Havnar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðarafelag í krøvum teirra til gistingarhús og matstovur um at fylgja galdandi sáttmála.

Seinni hósdagin sendi Gistingarhúsfelagið eina yvirlýsing út, har víst verður aftur, at sáttmálin fyri arbeiði á gistingarhúsum og matstovum ar galdandi fyri limirnar í felagnum. Í yvirlýsingini frá Gistingarhúsfelagnum verður sagt, at gistingarhúsini og matstovurnar ikki eru limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag og tískil heldur ikki hava verið við í sáttmálasamráðingunum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Út frá hesum verður staðfest, at matstovu- og hotelfyritøkurnar ikki hava skyldu at virka sambært sáttmálanum.



*Arbeiðarafeløgini hava hótt við tiltøkum ímóti teimum matstovum og gistingarhúsum, ið ikki arbeiða eftir sáttmálanum. Á hinari síðuni hava gistingarhúsini og matstovurnar sagt seg ikki kunna geva fólki ta kravdu lønina, uttan at koma í svára fíggjarliga kreppu*

**Frontarnir uppteknaðir**

Hvørgin av pørtunum leggur lok á, at teir ígjøgnum brátt farnu vikuna hava lagt seg eftir at tekna frontarnar upp við feitari skrift. Arbeiðarafeløgini hava hótt við tiltøkum ímóti teimum matstovum og gistingarhúsum, ið ikki arbeiða eftir sáttmálanum. Á hinari síðuni hava gistingarhúsini og matstovurnar sagt seg ikki kunna geva fólki ta kravdu lønina, uttan at koma í svára fíggjarliga kreppu.

Millumloysnin er longu farin at hómast og líkist í løtuni einum sáttmála í broyttum líki. Gistingarhúsfelagið hevur sagt seg fara at taka samráðingar upp við Føroya Arbeiðsgevarafelag eftir summarfrítíðina, og í Sosialinum í gjár ásannaði formaðurin í Gistingarhúsfelagnum, at ein sátmáli, ið kann virka fyri skipaðum starvsfólkaviðurskiftum, hevði verið tað besta fyri báðar partar í hesi heldur starvsfólkafløkjasligu vinnu.

**Hvar er Cafe Natúr**

Men hvar liggur Cafe Natúr málið í øllum hesum.

Hóast tað kundi sæð soleiðis út, so vóru tað ikki hópuppsagnirnar á Cafe Natúr týsmorgunin, ið fingu Havnar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðarafelag at taka svørðini niður av vegginum og leggja eftir matstovu- og gistingarhúsvinnuni.

Hendan herferðin hevur sambært Havnar Arbeiðskvinnufelag verið í umbúna leingi, og skuldi ætlandi byrja síðst í hesari vikuni.

Men Cafe Natúr málið var eitt ítøkiligt og sjónligt dømi um hvussu illa stendur til við arbeiðs- og lønarviðurskiftunum í hesi vinnuni, og tí nýttu fakfeløgini høvið til at bróta ígjøgnum fyrstu girðingina og hótta matstovurnar og gistingarhúsini við tiltøkum.

## Ólavsøkublaðið útkomið

*Í gjárkvøldið og í morgun varð Ólavsøkublaðið hjá Sosialinum borið út í hvørt hús í landinum.*

Tað er vorðin ein fastur táttur, at Sosialurin gevur út eitt serblað eina lítla viku undan ólavsøkuni. Í vár og í summar hevur blaðhúsið eisini gjørt fleiri smærri stevnubløð, ið hava ligið í vanliga Sosialinum, men eins og ólavsøkan er nakað væl meira umfatandi enn hinar stevnurnar á ærinum, er Ólavsøkublaðið so umfatandi í vavi, at tað kemur út sum eitt blað fyri seg.

Greinarnar í Ólavsøkublaðnum eru nakað øðrvísi enn tær, ið vanliga eru at síggja í Sosialinum. Allar hava á ein hátt tilknýti til ólavsøkuna, men tær spenna kortini vítt frá portrettum til hugleiðingar og so til meira dagsaktuellar greinar.

Tað eru blaðfólkini, ið vanliga skriva Sosialin, sum hava høvundað greinarnar í Ólavsøkublaðnum.

Góða ólavsøku og góðan lestrarhug.

## Leiðarin á Cafe Natúr sagt upp

*Minni enn eitt samdøgur eftir, at stjórin á Cafe Natúr bað ellivu av starvsfólkum sínum um ikki at koma aftur til arbeiðis, segði dagligi leiðarin á cafeeini sítt starv upp*

RÚNAR REISTRUP

Dagligu leiðararnir, ið eru komnir og farnir av Cafe Natúr, eru eftir hondini nógvir í tali.

Tann seinasta í røðini er Florentze Skipagøta, sum týskvøldið segði starv sítt sum dagligur leiðari á Cafe Natúr upp, bert nakrar tímar eftir at stjórin hevði sagt ellivu av starvsfólkunum á cafeeini upp týsmorgunin.

Sosialurin skilir, at orsøkin til at dagligi leiðarin segði starv sítt upp, var ónøgd við arbeiðsviðurskiftini.

Tað eru bert hálvur fjórði mánaður síðan Florentze Skipagøta varð sett at taka sær av dagliga rakstrinum á Cafe Natúr.